Volvo multi lock system:

# Trygdin byrjar áðrenn bilurin startar

**Innan bilídnaðin eru sviar kendir fyri at ganga á odda við at gera bilar sínar so tryggar sum yvirhøvur gjørligt. Seinasta nýggja frá Volvo er ein eksperimentbilur við alkohollási, trygdarbeltislási og ferðlykli**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tá bilførarin setur seg við rattið á nýggjasta eksperimentbilinum hjá Volvo, má hann fyrst anda í alkohollásið, sum situr í trygdarbeltinum. Um trygdarbeltið er spent og bilførarin ikki hevur drukkið alkohol, startar bilurin.

Eitt annað við hesum eksperimentbilinum er ein serligur ferðlykil, har t.d. foreldur, sum lána børnunum bilin, kunnu tasta lykilin inn soleiðis, at bilurin ikki kann koyra við meir a enn t.d. 80 km/t. "Hetta kann geva foreldrunum størri trygd í samband við ung, sum nýliga hava fingið koyrikort", sigur Ingrid Skogmo, leiðari av Volvo Cars Safety Centre. Hon sigur víðari at "Vit vita, at nógvar av teimum álvarsligastu ferðsluvanlukkunum skyldast at bilførarin er ávirkaður av rúsdrekka. Sambært ES-komissiónini doyggja umleið 10.000 fólk hvørt ár á evropesiku vegunum orsakað av rúsdrekkakoyring, og í nógvum av hesum vanlukkum eru bilførarin og tey ferðandi í bilinum ikki íbundin trygdarbeltið. Endamálið við "Volvo multi lock system" er heilt greitt at umgangast hesar álvarsligu bilvanlukkur",

ES-ferðsluhagtøl vísa, at tey ungu eru yvirumboðaði í ferðsluvanlukkum. Vandin fyri at ung millum 18 og 25 ár verða innbandaði í ferðsluvanlukkur er meira enn dupult so stór sum hjá persónum, sum eru millum 26 og 50 ár. Vanlukkurnar standast ofta ov nógvari ferð saman við ov lítið royndum bilførarum.





*Seinasta nýggja frá Volvo er ein eksperimentbilur við alkolási, trygdarbeltislási og ferðlykli*

Volvo vilja við "Volvo multi lock system" vísa á, at tað ber til at betra um trygdina á vegunum, við at tryggja sær at bilførarin ikki er ávirkaður av alkoholi, at hann er bundin í trygdarbeltið og bilurin ikki koyrir við meira ferð, enn hann er stillaður til.

# VW Beduin í 2006

**Tað tykist sum eingin endi er á øllum nýggju VW-modellunum, sum koma á marknaðin. Nú er so aftur ein á veg. Hesaferð verður tað ein sonevndur mini-MPV, ið helst fær navnið VW Beduin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Marknaðurin fyri mini-MPV er í støðugum vøkstri um allan heimin, og nú hava VW eisini ætlanir um ein slíkan bil. Talan verður um ein bil, sum verður bygdur yvir VW Golf Plus, men við 6 cm hægri fríhædd.

Designið er smart og agressivt, bilurin sær út sum ein lítil jeepur. Eftir ætlan fær VW Beduin kenda 4x4 systemið hjá VW, ið nevnist 4motion, har bakhjólini aktiverast elektroniskt, tá forhjólini missa vegfestið. Møguliga verður eisini ein útgáva, ið bert verður drivin av forhjólunum.

Motorskráin verður nøkulunda soleiðis: 2.0 litur bensin við 150 hk, 1.9 litur TDI við 105 hk, og tveir 2.0 litur TDI við ávikavist 140 og 170 hk. Møguliga verður ein V6 eisini á skránni.

VW Beduin kemur eftir ætlan á marknaðin næsta ár.




*VW Beduin, ið kemur á marknaðin í 2006, kemur helst at síggja nakað soleiðis út við smartum og agressivum designi*